## Brøndby vann Royal League



Brøndby vann í kvøld norðurlendsku Royal League-kappingina, har teir møttu arvafíggindunum úr FC Keypmannahavn í finaluni, sum var spæld á Brøndy Stadion. Dysturin endaði við einum 1-0 sigri til vertirnar. Í einum minni væl leiktum dysti megnaði heimaliðið at knógva meistarunum úr FCK. Einasta málið kom 5 minuttir undan steðginum, tá ið Martin Ericsson setti bóltin í netið eftir brotsspark. Harvið misti FCK møguleikan at vinna kappingina triðja árið á rað.

## Málmaðurin bleiv hetja

UEFA-Cup vinnararnir úr Sevilla vóru nær við at verða slignir úr kappingini, tá teir møttu Shaktar Donetsk úr Ukraina. Fyrri dysturin endaði við 2-2 javnleiki í Sevilla, men í Ukraina bendi alt á, at heimaliðið fór at vinna. Tá liðini fóru undir yvirtíðina, førdi Shaktar 2-1, men so fekk Sevilla hornaspark, og málmaðurin, Andres Palop, fór fram við. Hann var hægstur eftir hornasparkið frá Daniel Alves, og sendi bóltin í netið til 2-2. So máttu liðini út í umdyst, og her fekk Sevilla eitt mál afturat, og sostatt eru teir klárir til fjórðingsfinalurnar.

VB-Neistin:

# Finalisturin skal finnast

**Alt er púra javnt undan seinna hálvfinaludystinum ímillum VB og Neistan i Sunset kappingini hjá kvinnum. Neistin hevur tó havt takið á VB í Vági higartil í hesum kappingarárinum, men úrslitini hjá VB ímóti Neistanum eru blivin betri og betri**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*VB fekk sítt fyrsta stig ímóti Neistanum í ár, tá tær fingu javnleik í fyrra hálvfinaludystinum síðsta vikuskiftið. Sostatt er alt púra opið, tá liðini møtast í Vági sunnudagin.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Lagt verður upp til eitt brak av einum dysti, tá ið VB tekur ímóti Neistanum í seinnu hálvfinaluni í Sunset kappingini. Fyrri dysturin í høllini á Hálsi endaði við javnleiki 26-26, og tí er einki sum helst avgjørt undan seinna hálvfinaludystinum í Vági sunnudagin.

Um Neistin ætlar sær í finaluna, so skulu tær finna spælið fram, sum tær vístu í fyrra hálvleiki ímóti VB seinasta vikuskiftið. Her spældi Neistin skjótan og góan hondbólt, og hetta gav teimum eina fimm mála leiðslu í hálvleikinum.

VB skal hinvegin í sínum lag royna at gloyma alt um fyrra hálvleikinum á Hálsi síðsta vikuskiftið, og í staðin venda eyguni ímóti seinna hálvleiki. Her var VB oman á at kalla allan vegin, og vísir VB hetta spælið í høllini í Vági sunnudagin, so verður ikki lætt hjá Neistanum.

### VB fingið betri tak á Neistanum

Neistin var væl betri enn VB í grundspælinum, og eitt skifti var Neistin eisini oddalið í bestu vinnudeildini. Í fyrra partinum av kappingarárinum hevði Neistin eisini sera gott tak á kvinnunum úr Vági. Fyrri dysturin í grundspælinum var í Havn, og hesin endaði við einum tryggum 9 mála sigri til Neistin.

Onkur væntaði helst, at dysturin í Vági fór at gerast meir spennandi, men so var ikki. Her bukaði Neistin heimaliðið av við 13 málum, og sostatt vann Neistin stórt í báðum dystunum í grundspælinum.

Í endaspælinum vóru dystirnar heldur javnari. Fyrra dystin vann Neistin við trimum málum í Havn, og í seinna dystinum var um reppið, at VB fekk stig. Her taptu tær við einum máli, men úrslitini vóru bara batnaði ígjøgnum árið.

Seinast hesi bæði liðini møttust var í fyrru hálvfinaluni, og her bragdaði endiliga hjá VB. Eftir at hava verið aftanfyri við fimm málum í hálvleikinum, so eydnaðist teimum at fáa javnleikin, og sostatt hava tær eitt gott útgangsstøðið undan seinna hálvfinaludystinum á heimavølli.

StÍF-KÍF:

# Bæði fara eftir bronsuni

**Bronsuvinnarin skal finnast, tá ið StÍF tekur ímóti KÍF sunnudagin. Liðini liggja púra jøvn í stigum, men KÍF hevur klárað seg betri í innanhýsis dystunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Bæði StÍF og KÍF snávaðu síðsta vikuskiftið ímóti ávikavist Kyndli og H71, og hetta førdi við sær, at hvørki teirra kundi røkka finaluni um meistaraheitið. Nú ætla tey sær tó uppreisn, tí sunnudagin hava bæði møguleika at tryggjað sær bronsuheiðursmerkini í landskappingini. Kravið er greitt hjá báðum, dysturin skal vinnast.

Gongdi hjá strandingum hevur verið so sum so í endaspælinum. Teir hava vunnið fýra dystir og tapt fimm, og hetta hevur eisini gjørt, at teir hava mist annað plássið, sum teir høvdu, tá endaspælið byrjaði.

Hevur tað gingið minni væl hjá strandingum, so hevur gingið avbera væl hjá KÍF. Teir lógu aftast saman við H71, tá endaspælið fór í gongd, men í endapsælinum hava teir bert tapt ein dyst, meðan tríggir eru endaðir javnir, og fimm eru endaðir við sigri. Hetta gjørdi, at teir leingi høvdu ein møguleika at røkka til finaluna, men nú er hesin møguleikin farin.

### Jøvn lið

Munurin hevur ikki verið stórur á StÍF og KÍF í hesum kappingarárinum. Innanhýsis dystirnar hava verið sera spennandi, og báðir dystirnir í grundspælinum endaðu við javnleiki. Í fyrra dystinum í endaspælinum vann KÍF við einum máli, so áskoðararnir kunnu vænta sær ein spennandi dyst á Skála sunnudagin, har vinnarin fer avstað við bronsuheiðursmerkjunum. Skuldi dysturin endaður við javnleiki, so er KÍF betri fyri innanhýsis.

VÍF-Kyndil:

## Kappast um oddasessin

**VÍF og Kyndil skulu avgera, hvat av hesum liðunum skal vinna endaspælið, tá liðini møtast í Vestmanna í seinasta umfarinum av Atlantic Airways kappingini**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Dystirnir seinasta vikuskiftið lagaðu seg soleiðis, at FM-finalistarnir blivu funnir longu áðrenn seinasta umfar. Sjálvt um VÍF tapti í sínum dysti ímóti Neistanum, so blivu teir allíkavæl klárir til finaluna, tí bæði StÍF og KÍF msitu stig í sínum dystum. Eisini Kyndil bleiv klárt til finaluna við sínum sigri á StÍF.

Júst VÍF og Kyndil møtast eisini í seinasta umfarinum av landskappingini, og her fáa fólk møguliga eina ábending um, hvat tey kunnu vænta av finaluni. Ikki tí. Tað kann væl hugsast, at liðini fara at spara onkrar av leikarunum til henda dystin, soleiðis at hesir vera væl fyri til finaludystirnar.

VÍF og Kyndil møttust eisini í finaluni seinasta kappingarár, og tá dró Kyndil longra stráðið. So er spurningurin, um VÍF fer at basa grøna havnarliðnum hesuferð. VÍF hevur í øllum førum verið oddalið í at kalla alt kappingarárið, so teir eru helst smáir favorittar undan dystunum.